# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo


***Skrásetingar nr.:***

**L-E012-6**

# Leiðbeining
# um
# brúk av Calciumcyanid (Blásýru) í vakstrarhúsi v.m.

1. Treytin fyri at fáa útflýggja og kunna brúka Calciumcyanid, er at viðkomandi gjølla hava sett seg inn í galdandi trygdarreglur og hava staðið eina roynd í hesum á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í Tórshavn. Trygdarreglurnar fáast frá Arbeiðseftirlitinum.

2. Har langur flutningur er til sjúkrahús, skal útgerð til akutta viðgerð verða á arbeiðsplássinum. Henda útgerð umfatar 100% ilt, sum kann gevast við skorti, og 10 ampullir av Amylnitrit á 0,15g at brúka sum antidotur.

3. Læknarnir í økinum skulu kunnast um, at hetta eiturevni verður nýtt, og teir eiga at seta seg inn í aðra antidotviðgerð, sum verður givin i.v.

4. Hann, ið fær útflýggja Calciumcyanid, hevur ábyrgdina av evninum allastaðni har tað ferðast í samfelagnum, til tað møguliga verður latið Apotekinum aftur.

5. Evnið skal trygdarliga goymast undir lási, sum bert hann opnast við lykli, sum ábyrgdarmaðurin altíð hevur uppi á sær. Hurðin til rúmið ella skápið, ið verður nýtt til hetta endamál skal hava týðiliga merking, sum sigur frá, at eiturevni verður goymt her.

6. Einaarbeiði við hesum evni má ikki koma fyri. Tað skulu altíð verða minnst tvey sum fylgjast og tey skulu verða hóskandi vard móti, at evni kemur á húðina og móti at anda evnið í seg, t.v.s. hanskar og grímu við B2 + P2 sílu skulu nýtast. Gríman skal verja alt andlitið, t.v.s. bæði eygu, nøs og munn.

7. Tá evnið verður nýtt, skal alt húsið, t.v.s. allar møguligar inngongdir, merkjast væl og virðiliga, at har er lívshættisligt at koma inn.

8. Møguleiki skal verða at lufta út uttanífrá, t.v.s. hurðar og vindeygur skulu kunna opnast, uttan at farið verður inn í bygningin.

***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E012-2 um evni og tilfar frá 25. august 1983.

| ***Útgivið fyrstu ferð:*** **26. august 1991** | ***Seinastu broytingar:*** |
|---|---|

9. Tá útluftingin verður hildin at verða passandi, eigur allur bygningurin at verða kannaður við

mátitólum um konsentratiónin av Calciumcyanid er minni enn 5 mg/m;.

10. Allur reiðskapur og annað, ið hevur verið brúkt í samband við Calciumcyanid, eiga at verða væl og virðiliga reinsað og møguligar leivdir niðurgrivnar.

**Arbeiðseftirlitið**, 26. august 1991

Eli Davidsen, stjóri (sign.)